


*Smoltstøðin við Gjógv er ein av fleiri hjá Bakkafrost. Her verða virðir fyri milliónir skapt, millum annað av Kristian Jákup Joensen. Aftrat honum eru 2,5 fólk knýtt fast at støðini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Nógvar milliónir uppá spæl

**ALING Talið av smoltum er ørandi, tí ikki færri enn 1,6 milliónir smolt eru í kørunum á smoltstøðini við Gjógv. – Hetta er eitt spennandi arbeiði, sigur Kristian Jákup Joensen, sum hevur arbeitt her í mong ár. Smoltstøðin er partur av víttfevnda virkseminum hjá Bakkafrost Farming West**

Snorri Brend

**Gjógv:** Smoltstøðin her í bygdini hevur ein fyrimun, fram um mangar aðrar slíkar: Her er altíð nóg mikið av vatni.

Omanfyri bygdina liggur ein stórur dalur og ein vatnrík á, - Dalsá, ella Stórá sum gjáarfólk kalla hana.

Henda tryggjar støðini gott og rennandi vatn, saman við tí vatninum sum verður endurnýtt á støðini, soleiðis at virksemið av smoltinum, sum er komið higar av alistøðini við Áir, kann halda fram alt árið.

Men tey verða tó ikki verandi her norðuri. Tey fara øll rættiliga víða til aling á øðrum firðum og sundum.

Í heyst eru soleiðis farin eini 300.000 smolt til alingina í Hvannasundi, 200.000 til alingina í Haraldssundi, 400.000 til alingina í Fuglafirði og herfyri fóru eini 400.000 smolt til víðari aling í Sundalagnum.

– Vit hava nakað eftir, eini 400.000, og skal tað setast út í Svínáum. Og so fara tey seinastu 70.000 smoltini til alibrúkið á Kunoyarnesi. Tað verður í november mánaði, greiðir Kristian Jákup Joensen frá.

Hóast nógv smolt eru sett út, verður kortini arbeitt við næsta árganginum.

Í løtuni svimja eini 800.000 smolt, ið viga umleið 16 gramm stykkið, í kørunum. Og í næsta mánaði koma uppaftur 8-900.000 rogn inn aftur á smoltstøðina.

## Eyga-rogn

Arbeiðsgongdin á hesari smoltstøðini er rættiliga einføld, hóast her liggja bæði stór ábyrgd hjá arbeiðsfólkunum og milliónavirði í kørunum.

Higar koma tey sokallaðu eygarognini, har ein sær eyguni í rogninum. Hesi rognini kann ein fáa til keyps úr grannalondum okkara, men smoltstøðin við Gjógv hevur altíð fingið síni frá støðini hjá Fiskaaling við Áir. Eftir einum mánaði ella so koma tey út og viga tá umleið 0,15 gramm stykkið.

Um hetta mundið hava tey ein lítlan posa undir maganum, sum gevur teimum føði tann næsta mánaðin. Fyrst tá byrjar ein spakuliga at fóðra tey.

– Tá tey so er komin uppá eini 100 gramm, verða tey slept á sjógv, sigur Kristian Jákup.

Tey fingu rognini í november mánaði í fjør, og ganga vanliga 10 mánaðir áðrenn tey verða slept út.

Í dag eru flestu av teimum 1,6 milliónum smoltunum farin á sjógv, meðan ein lítil partur er eftir í kørunum her norðuri.

Nú verður so smátt farið undir at rigga til at taka ímóti næstu sendingini av eygarognum, einaferð í næsta mánaði.

– Vit eru vanliga 3,5 fólk knýtt at støðini. Men tá vit vaccinera ella skilja í støddir, taka vit tvey fólk eyka inn, sigur Kristian Jákup Joensen.